## DAGSINS MEINING

# Føroysk undirbrotligheit

»Bert lúsin útlendsk er«. Soleiðis verður oftani tikið til her á landi, og fríggjadagin fingu vit enn eitt dømi um, at soleiðis er so mangan.

Sokallað emballagulógin – lógin um íløt til øl, mineralveatn og lidnar leskidrykkir – skal nú broytast. Orasøkin er, at fríhandilsavtalan við Ísland ikki loyvir hesum. Ella rættari, tí íslendska tulkingin av hesi lóg ikki loyvir hesum!

Frá íslendskari síðu verður sagt, at talan er um tekniska handilsforðing – protektionismu, og at lógin tí ikki samsvarar við fríhandilsavtaluna. Her skal verða frítt hjá íslendskum útflytarum at koma við øli, sodavatni v.m. í teimum íløtum, sum tey halda vera hóskiligt.

Tað tykist, sum hava bæði innlendismálaráðið og løgmaður fullkomuliga gloymt, at talan er ikki um nakra vinnulóggávu. Talan er um eina umhvørvislóggávu, sum hevur til endamáls at verja umhvørvið á landi og á sjónum.

Soleiðis var í øllum førum, tá danskir útflytarar seinast í 80'unum royndu at selja føroyingum juice í blikk-dósum. Eisini hóast handilsmenninir vildu vera við, at talan var um handilsforðing.

Talan var eisini um umhvørvislóggávu, tá føroysk (partvíst íslendsk) handilsketa fyri góðum 10 árum síðani seldi sodavatn í stórum eingangsfløskum. Eisini hóast fyritøkan setti í verk serstaka innsavningarskipan fyri fløskurnar, sum tó ikki kundu endurfyllast.

Og soleiðis var eisini, tá føroyskur pub-eigari royndi at fáa loyvi at innflyta Guinnes-øl í fløskum, sum tó ikki verða endurnýttar, men ístaðin knústar og stoyptar av nýggjum.

Men nú er øðrvísi. Íslendingar siga, at talan er um handilstekniska forðing, og so verða eingi spurnartekin sett. At onkur serskøltur her heima hevur eina øðrvísi fatan av støðuni, verða eingi atlit tikin til. Íslendska orðið er lóg – og harvið verður tað. Men tað er kortini merkisvert, at lóggávan – sum nú brádliga er vinnulóggáva – hoyrir heima í Innlendismálaráðnum. Har plaga tey millum annað at umsita umhvørvismál – ikki vinnumál!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sandoyggin 2015



JOEN PETER PETERSEN
Sandoyar Sýslu Sambandsfelag

**Sambandið millum Suður- og Sandoynna verður av avgerandi týdningi fyri Sandoynna, nú tosað verður um visión 2015, skrivar Joen Peter Petersen**

Nú vit hoyra at tunnilin til Norðoyggjar letur upp, mugu vit í Sandoynni halda fast um, at næsti undirsjóvartunnil, ið skal gerast, verður tann í Sandoynna. Vit skulu í holt við at bora beinanvegin. Fara minnini aftur í tíðina, eru tað eini 3 ár síðani , tað varð lagt fram á ting, at Sandoyggin er tann næsta, sum farast skal undir. Hetta eru stórar íløgur, og fólkagrundarlagið er lítið í mun til íløguna, men samstundis meta vit, at Sandoyggin sum framleiðslueind, serliga av landbúnaðarvørum, hevur stóran týdning fyri landið, og møguleikar fyri bústaðarøkjum eru nærmast óavmarkaðir, og hetta kemur at hava stóran týdning fyri alt landið.

Tá hugsað verður um farleið millum Sandoynna og Suðuroynna, og møguleikar fyri at økja títtleikan á sjóvegis farleið millum Sandoynna og Suðuroynna upp til t.d. 10 ferðir um dagin, gevur hetta Suðuroynni ein heilt nýggjan møguleika, og verður tá hugsað um samlaðu ferðsluna við fólkagrundarlagnum í Sandoynni og Suðuroynni, so eiga fíggjarkarmarnir at síggja hampiligir út.

Tí halda vit, at byrjast skal so skjótt seismisku kanningarnar eru gjørdar lidnar.

Tað eru nógvir bilar sum vera førdir um Skopunarfjørð. Teistin flutti í 2005, 48795 persónbilar/lastbilar og 152.223 ferðafólk. Her eru bilførararnir tiknir við , so tað vil siga, at gott og væl 103.000 ferðafólk eru uttan bil, og fer bara helvtin av hesum ferðafólkum at ferðast við bili, ja, so eru vit uppi á 100.000 bilum árliga, og í mun til ferðafólkatalið 2004, var vøksturin á sandoyarleiðini 4,1% fyri 2005. Fáa vit eisini tey frá Suðuroynni við, fer ferðafólkatalið upp um 315.000. Har var ferðafólkatalið í 2005 uml. 164.000.

# Viðmerking til fyrra Flaggdagsálitið



GORDON EJDESGAARD

**Fáa vit ikki broytt formidlingina av Stjórnskipan Føroya til annað enn at geva bøkur út fyri tey fáu, sær ikki gott út. Jú fleiri bøkur, verri verður. Tess fleiri uppskot torskildari verður. Hetta er beinleiðis í mótsøgn við princippið "stutt og greitt", sum sjálvt uppskotið til Stjórnskipanina m.a. byggir á, skrivar Gordon Ejdesgaard millum annað**

Fyrst er at siga takk fyri eitt gott og áhugavert arbeiði sum fyrra Flaggdagsálitið er. Havi ikki so nógv at viðmerkja til sjálvt uppskotið til Stjórnarskipan Føroya, men meira um tann partin av álitinum sum eitur Skipanin. Sjálvur lesið eg álitið soleiðis, at lógarteksturin er vorðin til, sum m.a. úrslit av kjakinum í partinum Skipanin.

Grundgevingarnar fyri eini stuttari Stjórnskipan eru sera greiðar, og niðurstøðuni eri er samdur í. Ein ikki ov stutt, men heldur ikki ein Stjórnskipan sum fer í smálutir. Hetta hevur hepnast í uppskotinum. Vandin fyri politiskum paragraffpedantarí gerst minni, færri og breiðari formuleringarnar eru í lógartekstinum. Gott samsvar millum ætlan og úrslit, sæð frá einum teoretiskum, men ikki minst praktiskum sjónarmiði. Søguliga gjøgnumgongdin av møguleikunum og grundgevingar er spennandi lesnaður – áhugavert og vælskrivað.

Men tað kemur óiva, í praksis, at taka væl av tol og tíð at implementera hesa – ella líknandi- sannførandi í praksis. Og aftur hinvegin- ein Grundlóg, sum man vera frægari ella rætta orðið – er ikki nakað sum verður soleiðis skrivað og implementerað her og nú. Talan er um at leggja høvuðskarmar fyri politisku skipanini. TA‹ grundleggjandi fundamentið undir tjóðini.

Vit sita tó eftir við m.ø. tí trupulleika, sum formaðurin Jóan P. Joensen greiðir frá. Ein kann bera ótta fyri "at tjóðskaparmótpartarnir skerpa klørnar". Og kanska kinkur kemur í. Eftir míni meta hava vit júst ein høvuðstrupulleikan her. Hin høvuðstrupulleikin er um "vanligi føroyingurin" sær nakra nyttu av eini nýggjari Stjórnarskipan. Bert heitið Stjórnarskipan hevur ikki sama dám og tign sum orðið Grundlóg. Ikki enn í hvussu er. Her er gjørdur ein málsligur kiksari, sum kann koma okkum aftur um brekku.

Hvar er forrestin logikkurin við eini Grundlógarnevnd, sum skuldi gera uppskot til Grundlóg, men sum nú ger uppskot til Stjørnskipan. Vanligi føroyingurin man uttan iva spyrja eftir muninum. Eru fólk eitt sindur ørkymla, skilji eg tað væl. Eg eri í hvussu er.

Harnæst er tað ein spurningur um materialistiski føroyingurin ikki hevur annað at hugsa um enn…enn eina lóg.

Komandi uppgávan er ikki nakað, sum bert eigur at ganga fyri seg innan tinggátt. Men eg eri bangin fyri, at tað gerst veruleikin. Fáa vit ikki broytt formidlingina av Stjørnarskipan Føroya til annað enn at geva bøkur út fyri tey fáu, sær ikki gott út. Jú fleiri bøkur, verri verður. Tess fleiri uppskot torskildari verður. Hetta er beinleiðis í mótsøgn við princippið "stutt og greitt", sum sjálvt uppskotið til Stjørnskipanina m.a. byggir á. Tó skal sigast at Grundlógarnevndin ikki kann gera annað, enn henni er álagt.

Her er ein beinleiðis kunningartrupulleiki. Tað er fullkomuliga órelistisk at vænta, at fólk- hóast ókeypis bøkur- lesa slíkan tungan lesna. So her skulu" aðrir bollar í suppuna", um tað er til at skilja, góðu menn. Hvør er so uppgávan í praksis: jú, at selja Stjørnskipan Føroya til okkara, so vit skilja, hvør hon er. Sum er, sær tað nakað vónleyst út, skal eg viðganga. Og enn havi eg ikki møtt nøkrum, sum við vissu kundi greiða frá, hvat veruliga gongur fyri seg. Onkur helt fyri:" Jamen vit hava eina Grundlóg, hvat skulu vit við tveimum"ð Og tað er rætt. Fáa vit okkara, so hava vit væl tvær, so leingi vit eru partur av Danmark. At tað so ikki er heilt óvanligt at hava tvær grundlógir, ger ikki okkara støðu einfaldari.

Gamaní at halda ráðstevnur fyri teimum, sum hava áhuga og vita hvat tað snýr seg um. Men hvat við meirilutanum, sum møguliga er troyttur av politiska kjakinum og keglinum. Her hava vit kanska størstu PR-uppgávu í Føroya søgu. Henda uppgáva liggur á borðið løgmans.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.